

www.oljan.fo

**Jan Müller** 21 - 05 - 2012

# Kjarnuborgingar í Grønlandi í heyst

Oljufelagið Cairn Energy hevur fyrr boðað frá, at felagið ætlar sær at halda fram við oljuleitingini í Grønlandi í 2014, men nú fræттist, at felagið ætlar at gera nakrar kjarnuboringar longu í heyst fyri at fáa størri kunnleika til undirgrundina í Baffinvíkini. Cairn skrivar í einari fráboðan til virðisbrævamarknaðin í London, at Shell skal standa fyri kjarnuboringunum vegna fleiri feløg, men at tað grønlendska landsstýrið ikki hevur givið tað neyðuga loyvið enn. Cairn skrivar í fráboðanini, at ætlanin er at gera minst 10 kjarnuboringar niður í undirgrundina í Baffinvíkini. Hini feløgini, sum eru við í kanningunum, eru Shell, Statoil og Mærsk, og feløgini vænta, at úrslitið av boringunum kann geva týðandi upplýsingar um møguleikarnar í Baffinvíkini. Fyrr í ár keypti Statoil seismiskar upplýsingar frá Pitu-blokkinum. Tey verða væntandi liðug at granska upplýsingarnar eina ferð í summar, og Cairn ætlar sær at halda fram við veruligum leitiborgingum har í 2014, sigur felagið. At enda í fráboðanini til virðisbrævamarknaðin í London skrivar Cairn Energy, at í síðsta mánað var felagið liðugt við fleiri seismiskar kanningar á fleiri leiðum í Suðurgrønlandi. Úrslitini verða ætlandi løgd fram í heyst. Ímeðan leitar felagið eftir samstarvsfeløgum til leiting í Suðurgrønlandi, skrivar felagið.